Audi A6:

# Ársins bilur í øllum heiminum




*Audi A6 er kosin ársins bilur í øllum heiminum. Bilurin hevur annars fingið nógvar heiðurlønir, síðan hann kom á marknaðin í fjør*

**Ein dómsnevnd av 48 altjóða motorjournalistum hevur kosið Audi A6 til "Årets bil í verden" sum tað eitur á donskum. A6 vann yvir 35 kappingarneytum í nógvum ymiskum klassum á altjóða bilaframsýningini í Toronto í Kanada**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Vit hoyra á hvørjum ári um, at nýggir bilar verða heiðraðir við ymiskum titlum sum t.d. ársins bilur í Danmark, Europa, USA, Japan ella hvar tað skal vera, men nú er nýggi Audi A6 kosin til ársins bil í øllum heiminum.

Teir 36 ymisku bilarnir, sum kappaðust um heitið sum ársins bilur í øllum heiminum, vórðu mettir eftir kriterium sum t.d. kvaliteti, koyrieginleikum og eini heildarmeting av bilinum.

Nýggi Audi A6 hevur annars fingið nógvar heiðurlønir, síðan hann kom á marknaðin í fjør.

# Skoda Yeti frumsýndur í Genéve




*Fyrsta almenna myndin av konseptbilinum Skoda Yeti, sum verður frumsýndur á altjóða bilaframsýningini í Genéve fyrst í hesum mánaðinum. Bilurin er rættuliga sermerktur*

**Á altjóða bilaframsýningini í Genéve fyrst í hesum mánaðinum, verður ein heilt nýggjur Skoda frumsýndur. Talan er um konseptbilin Skoda Yeti, ið er rættuliga sermerktur**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Yeti er eitt designstudie hjá Skoda, sum eisini er ein ábending um, hvussu Skoda bilarnir koma at síggja út í framtíðini, eins og vit sóu tað við konseptbilinum Skoda Roomster, sum varð frumsýndur í fjør.

Bilurin, sum er ein sonevndur SUV, sær rættuliga sermerktur út við t.d. takboylum ið eru bygdir inn í stólpan við for- og bakrútin, og handtakið til bakhurðina situr í hurðastólpanum.

Skoda Yeti verður drivin av øllum fýra hjólunum og skal eftir ætlan verða bæði býbilur og "off-roadari".

Enn er eingin avgerð er tikin um bilurin skal framleiðast, tað velst nokk eisini um, hvussu væl hann verður móttikin á framsýningini í Genéve.

## Mercedes made in China



Eftir ætlan koyrir fyrsti Mercedes-Benz "Made in China" út av eini nýggjari bilverksmiðju í Kina við endan av 2006. Árliga framleiðslan at byrja við verður upp á 25.000 til 30.000 bilar, men hon kann tvífaldast eftir stuttari tíð, verður upplýst frá DaimlerChrysler

*Kelda: Motor Magasinet*

## Mini Subaru í Japan



Subaru eru komnir á japanska marknaðin við lítla býbilinum Subaru R1 við 4 syl. 660 cc 16V motori variablari ventilstýring og framkomnum automatiskum girkassa sum reduserar útlátið við upp til 50 prosentum í mun til U-LEV (Ultra Low Emission Vehicle) umhvørviskrøvini. R1 kemur ikki til Evropa

*Kelda: Motor Magasinet*

## Suzuki best í februar



Við 21 nýggjum bilum varð Suzuki mest selda bilmerki í Føroyum í februar 2005

*Kelda: Berg Motors*